## Krevja meiri tosk

Í Grønlandi er fiski- og veiðimannafelagið KNAPK als ikki nøgt við avgerðina hjá landsstýrinum at lata eina toskakvotu upp á 1.000 tons fyri at fáa fiskimenn, sum veiða svartkalva, til at veiða tosk ístaðin fyri. Kvotan er latin einum nýstovnaðum felagi, sum skal leiga ein trolara til at fiska tosk. KNAPK tekur undir við málinum at flyta menn frá svartkalva til tosk, men sigur, at 1.000 tons nøkta als ikki tøervin, sigur KNR.



## Hvalastovnar veksa

Umhvørvisverndarfelagsskapurin IUCN sigur í einari nýggjari frágreiðing, at fleiri stórhvalastovnar eru vaksnir tey seinastu árini. IUCN ivast ikki í, at stovnarnir eru mentir, síðani hvalaveiðibannið kom í gildi í 1986. Men frágreiðingin um støðuna hjá havsions hvalasløgum er ikki bara jalig, tí har stendur eisini, at smáhvalirnir fækka, og at eitt nú nýsan er í vanda. Orsøkin er sambært ICUN millum annað, at nógvur smáhvalur endar í gørnum og trolum og doyr.

# Spælipláss r



*Inni í einum báti á spæliplássinum í Hvalvík var ein skrúva, sum sá rættiliga vandamikil út*

*Einar Hansen, spæliplássumsjónarmaður*

**Onki verður gjørt fyri at tryggja børnini á barnagørðum í Føroyum, men øll arbeiðsfólkini eru tryggjaði av arbeiðseftirlitinum. Hetta sigur Einar Hansen, spæliplássumsjónarmaður, um støðuna á føroyskum spæliplássum**

SPÆLIPLÁSS
*Eirikur í Jákupsstovu*
*red@sosialurin.fo*

Í øðrum londum er vanligt kanna trygdina á spæliplássum. Soleiðis er ikki í Føroyum. Einar Hansen, sum er uppvaksin í Føroyum, er góðkendur spæliplássumsjónarmaður í Danmark. Hann var í Føroyum í summar og ógvaðist við ávísar søgur hann hoyrdi. Síðani hevur hann eisini verið og hugt eftir ymsum spæliplássum í Føroyum.

- Summastaðni er talan um veruligar deyðsfellur. Dømir eru um torn í barnagørðum, har so langt er millum brettini, at ein barnakroppur væl kann detta niður ímillum, meðan høvdið ongan veg sleppur. Hetta er tann vissi deyði hjá einum barni, sigur Einar Hansen um støðuna á nógvum spæliplássum í Føroyum.

### Gott handverk

- Í Føroyum er tað ofta so, at spæliplássini síggja gott út, men lítið verður hugsað um trygdina hjá børnunum. Serliga er støðan keðilig, tá talan er um trappurtin og torn. Trinini eru ov smøl og kunnu serliga elva til skaðar á armar og bein. Skaðar vegna fall eru mest vanligu óhappini á spæliplássum, og tí hevur hæddin á ymsu leikunum nógv at siga. Í Danmark eru greiðar reglar um, hvussu eitt spælipláss skal byggjast, og hvussu ymisku lutføllini skulu vera. Til dømis skulu torn hægri enn 60 sentimetrar hava girðing og góðkent undirlag, meðan trin skulu vera minst 14 sentimetrar djúp, greiðir Einar Hansen frá.

### Skaðar

Árliga enda umleið 20000 børn á ymisku skaðastovunum í Danmark við skaðum, ið henda á spæliplássum. Rokna vit hetta leysliga um til fólkatalið í Føroyum, skuldu umleið 170 børn árliga fingið so stórt mein á spæliplássunum, at tey máttu á skaðastovuna. Hvussu er statt við hesum í Føroyum vita vit ikki, tí ongi almenn tøl eru at fáa fatur á í løtuni.

Í Danmark - sum vit ofta vilja samanbera okkum við - er greið lóggáva um hvør hevur ábyrgdina av trygdini á einum spælipláss. Tá talan er um privat spælipláss er tað altíð eigarin, ið situr við evstu ábyrgd, og er talan um almenn spælipláss, sum oftast barnagarðar og frítíðarskúlar, er tað vanliga leiðarin á stovninum, ið hevur fingið ábyrgdina tillutaða.

Tað er sokallaða produktansvarsloven, ið er grundin fyri allari trygd á spæliplássum í Danmark, men hon er ikki galdandi fyri Føroyar og Grønland, so ongi lógarfest landsumfatandi krøv eru um trygdina á spæliplássum í Føroyum, men ávísar kommunur hava gjørt sær sjálvum reglar.

- Onki verður gjørt fyri at tryggja børnini á barnagørðum í Føroyum, men øll arbeiðsfólkini eru tryggjaði av arbeiðseftirlitinum. Tað er løgi, tí børnini skulu sjálvandi eisini verjast, sigur Einar Hansen.



*Tað eru sjáldan 35 sentimetrar upp til botnin á reiggjum, sum er lógarkrav í Danmark, á føroyskum spæliplássum*

### Føroysk spælipláss

Sosialurin var í gjár og vitjaði tvey spælipláss í Sundalagnum. Havast skal í huga, at ongin lóggáva er um trygdina á spæliplássum, og tí er onki ólógligt við hesum spæliplássum, men hvørki teirra var nær við at liva upp til donsku DS/EN 1176 og DS/EN 1177 krøvini fyri spælipláss.

Spæliplássini eru bæði kommunal og hoyra til barnagarðar, ávikavist á Oyrarbakka og í Hvalvík. Harafturat eru báðir barna-